# Vallærugreinar í 8. flokki
# skúlaárið 2024-25

Góðu næmingar og foreldur

Nú nærkast tíðin, tá ið tit í 7. flokki skulu taka støðu til, hvørjar vallærugreinar tit hava hug at velja tykkum í 8. flokki.

Sum skilst, eru tit spent at sleppa at velja, og tí fáa tit her eina stutta kunning um, hvørjar vallærugreinar skúlin hevur at bjóða næsta skúlaár.

Í 8. flokki fara tit at hava 28 kravdar undirvísingartímar um vikuna. Harumframt ber til at velja sær eina ella fleiri vallærugreinar, men minnist tó til ikki at velja ov nógvar. Tíð skal eisini vera til annað.

Alt eftir hvørjar vallærugreinar tit velja, er vert at hava í huga, at um tit ætla tykkum at fara á náttúrubreyt, tilfeingisbreyt ella tøknibreyt í miðnámi, mugu tit hava fylgt undirvísingini í alis-/evnafrøði í 8. og 9. flokki, og um tit ætla tykkum á hugbreyt í miðnámi, mugu tit hava fylgt undirvísingini í týskum í 8. og 9. flokki, og harumframt skulu tit til próvtøku í hesum lærugreinum á sumri 2026, um próvtøkur verða.

**Breytir og miðnámsskúlar:**

- Gymnasialt miðnám — Glasir, Tórshavn (www.glasir.fo)
    - Búskaparbreyt
    - Hugbreyt
    - Náttúrubreyt
    - Fyrireikingarbreyt
    - Skapandi fyrireikingarbreyt

- Yrkisrættað nám — Glasir, Tórshavn (www.glasir.fo)
- Tilfeingisbreyt — Miðnám í Vestmanna (www.fiskvest.fo)
- Tøknibreyt — Tekniski skúli í Klaksvík (www.tsk.fo)

**Skúlaárið 2024-25 kunnu tit velja hesar vallærugreinar:**

- ***týskt*** *4 t/v*
- ***alis-/evnafrøði*** *3 t/v*
- ***motorlæra*** *2 t/v*
- ***sniðgeving*** *2 t/v*
- ***tónleik*** *2 t/v*
- ***heimkunnleika*** *2 t/v*
- ***sjóvinnu*** *2 t/v*
- ***skúlaFM*** *2 t/v*
- ***hondbólt*** *4 t/v*
- ***fótbólt*** *6 t/v*

Viðmerkjast skal, at undantikið týskt og alis-/evnafrøði, eru hinar vallærugreinarnar treytaðar av, at tímar verða játtaðir, og at undirtøkan verður nóg stór.

Meira kunning um vallærugreinarnar síggja tit á heimasíðu skúlans: svl.fo/skúlin/skúlavegleiðingin

Eru spurningar ella ivamál, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Guðný Wardum, skúlavegleiðari
Telefon 280314
gudny.wardum@skulin.fo

Høgni Joensen, skúlastjóri
Telefon 214109
hogni.joensen@skulin.fo

# Skúlin við Løgmannabreyt

2024-25